

# Ólavsøkutiltakið á Bryggjuni

Tiltakið byrjaði klokkan 14.00, og um hettar mundið var lítið og einki fólk. Men so við og við kom ein hýrivagnsbilurin fyri og annar eftir við gestum, ið vóru komin oman á Bryggjuna fyri at hugna sær saman við vinum og kenningum í góða summarveðrinum. Bert fáar tímar seinni var alt økið stústappað við føroyingum og øðrum, sum á ein ella annan hátt hava tilknýti til vøkru oyggjarnar í Norðuratlantshavi.

"Oys, oys, ert tú her? Nú er langt síðani vit hittust!" var mangan at hoyra. Jú, fleiri ferðir fekk ein kenslu av at vera á Ólavsøku í Havn í gomlum døgum.

Í hvítu tjøldunum kundi tú keypa kalt danskt fatøl og hitt heldur sterkara frá Føroya Bjór. Somuleiðis bar til at keypa vín, kaffi, te, pylsur, turran fisk og spik og breyðflísar við føroyskum viðskera. Okkurt gott var eisini til børnini, sum t.d. poppkorn.

## Uppá gólv

Hýrurin á fólki var avbera góður, og knappliga reistust fólk úr setri og fóru uppá gólv. "Og dansen den går, så let igennem lunden", rungaði um alla Bryggjuna.

Tað var leiðarin í Føroyahúsinum, Hans Petur í Brekkunum, sum setti Ólavsøkuna. Hann helt eina avbera góða røðu, sum fevndi víða.

Stutt eftir var harmonikutónleikur á skránni og settu Regin og Flóvin Jacobsen ein jaligan dám á haldið.

Sangfuglur okkara, sum á sinni kláraði seg ovurhonds væl í donsku songkappingini "Stjerne for en aften", Guðrun Sólja Jacobsen, var eisini á pallinum uttandura. Í viðførinum hevði hon gittarleikaran Hylle, og varð duoin væl móttikin.

Á ovastu hædd hugnaðu serstakliga børnini sær saman við gandakallinum Magnus, og niðri undir kundi tú skoða sera spennandi og forvitnisligu listaframsýningina hjá Trónda Paturssyni.

Samanumtikið eitt Ólavsøkuhald, ið seint fer í gloymskuna.

*Tekstur/myndir: Símun úr Konoy*





